# Vísindafólk á Føroyamálsdeildini útgivið tríggjar bøkur

**Í hesum døgum er satt útgávurok á Føroyamálsdeildini. Starvsfólk á deildini hava skipað fyri, at ikki færri enn tríggjar bøkur koma út í somu viku. Tað er Føroya Fróðskaparfelag, sum hevur givið allar 3 bøkurnar út**

ÚTGÁVUR
*Tíðindaskriv*

Í sambandi við útgávurnar skipa Fróðskaparsetrið og Føroya Fróðskaparfelag fyri móttøku og tíðindafundi á Føroyamálsdeildini, V. U. Hammershaimbs gøtu 16, hósdagin 1. juli kl. 14.00. Høvið verður hjá fólki at ogna sær bøkurnar og rithøvundarnir skriva í bøkurnar.

Turið Sigurðardóttir, lektari í bókmentafrøði hevur skrivað bókina: Bókmentasøgur - Greinasavn. Í bókini eru fimtan greinir um evni, sum fevna frá 18. til 20. øld. Greinirnar hava, uttan tríggjar, staðið í ymsum tíðarritum tey seinastu umleið 15 árini. Flestallar greinir eru um skaldskap í bundnum máli, nakrar um óbundið mál. Greinirnar viðgera føroyskar bókmentir og mentan, m.a. út frá hugtøkum sum barokkur, klassisisma, upplýsing, romantikkur, modernisma og postmodernisma. Tær tríggjar greinirnar, sum ikki eru prentaðar áður, eru: grein um eina minnisyrking í alexandrinskum ørindislagi, á donskum, eftir Hanus Jákupsson Debes, løgmann av Oyri; grein um fyrstu metrisku yrkingina á føroyskum, Føroyarímuna eftir Alexandur Weihe úr Søldarfirði; og grein um Hammershaimb sum tjóðarsmið út frá viðgerð av Anthologiini og yrkingum um Hammershaimb.

Anfinnur Johansen, lektari í málfrøði, og Hans Joensen, orðabókaritstjóri, hava ritstjórnað bókina Mál í mæti, sum er heiðursrit til Jóhan Hendrik W. Poulsen, professara, á sjeyti ára degnum. Í bókini er savn av greinum hansara skrivaðum í eitt fjøruti ára tíðarskeið. Bók-in er býtt sundur í tveir part-ar. Í fyrra parti eru 43 greinir, skrivaðar á føroyskum, íslendskum, donskum og enskum. Tær hava allar staðið á prenti áður í bókum og tíðar-rit-um. Greinirn-ar standa í tíðarrøð, tann fyrsta stóð í Skírni í 1963 og tann síðsta í Med 'bil' i Norden i 100 år frá 2003. Seinni part-ur nevnist Orð og yrði, bók-stava-rím eins og bók-ar-heitið, og fevnir hann um ym-ist til-far, sum ber 12 yvirskriftir, 7 teirra hava ongantíð ver-ið á prenti áður. Tað síðsta í seinna parti er eitt úrval av nýggjyrðum hansara, 500 í tali.

Höskuldur Þráinsson, Hjalmar P. Petersen, Jógvan í Lon Jacobsen og Zakaris Svabo Hansen hava skriva nýggja føroyska málløru Faroese - An Overview and Reference Grammar. Ætlandi fer henda nýggja málløran, sum er á enskum, at avloysa bókina hjá Lockwood, An Introduction to Modern Faroese frá 1977, og sum rímiligt er, er henda nýggja málløran væl størri og tekur væl meira við enn Loockwood gjørdi í sínum undangonguarbeiði, tí í hesari nýggju málløruni eru tey nýggjastu granskingarúrslitini tikin við, umframt tey gomlu. Granskarar, serliga útlendskir, hava leingi bíðað eftir einari umfatandi føroyskari málløru, tí hóast granskað verður í føroyskum her heima, er so ógvuliga nógv eftir at gera, og kann henda bókin kveikja monnum til, umframt at hon verður, eins og heitið vísir, ein tílvísingarbók.



*Anfinnur Johansen, frá Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya, handar Jóhan Hendriki W. Poulsen, bókina »Mál í mæti«, sum er givin út í sambandi við sjeyti ára føðingardag hansara*

**Um bøkurnar**
Turið Sigurðardóttir: Bókmentasøgur - Greinasavn, Føroya Fróðskaparfelag, Tórshavn 2004 - 382 síður
Perman er prýdd við skurði úr málningi eftir S.J. Mikines av Símuni av Skarði.
Prísur: 390,- í bókabúðunum

Jóhan Hendrik W. Poulsen: Mál í mæti.
Ritstjórar: Anfinnur Johansen og Hans Joensen.
Føroya Fróðskaparfelag, Tórshavn 2004 - 536 síður
Kápumynd: Tróndur Patursson
Prísur: 325, - í bókabúðunum

Höskuldur Þráinsson, Hjalmar P. Petersen, Jógvan í Lon Jacobsen og Zakaris Svabo Hansen: Faroese - An Overview and Reference Grammar
Føroya Fróðskaparfelag, Tórshavn 2004 - 501 síður
Prísur: 380, - í bókabúðunum







## Solveig nýggj forkvinna

**Á aðalfundi hjá felagnum fyri hoyribrekað stillaði Nicolina Dahl ikki uppaftur sum forkvinna**

AÐALFUNDUR
*Tíðindaskriv*

Felagið fyri hoyribrekað hevur hildið árligan aðalfund. Formaðurin Nicolina Dahl, Klaksvík stóð fyri vali og stillaði ikki uppaftur. Í hennara stað varð Solveig Islfeldt vald í nevndina.

Nevndin hevur síðan skipað seg við Solveig Isfeldt, Tórshavn sum forkvinnu, Katrin Rubeksen, Tórshavn sum skrivara og Jórun Johannesen, Norðskála sum kassameistara. Tiltakslimur er Jákup Danielsen, Tórshavn. Hesi seinastu árini hevur Otto Juul Sjóstein verið grannskoðari hjá felagnum, men hann ynskti ikki at halda fram og í hansara stað varð Nicolina Dahl vald til grannskoðara.

Alt fleiri fólk í góðum árum fáa hoyribrek at dragast við og felagið veksur skjótt. Í løtuni eru umleið 330 limir.

## »Ferðin til Gjáar«

**Heilafelagið fer nú aftur undir árliga tiltakið "Ferðin til Gjáar". Hetta tiltak hevur verið í fleiri ár, men í fjør var tiltakið av ongum**

TÍÐINDASKRIV

Nevndin í Heilafelagnum hevur avgjørt at taka stig til hetta tiltak aftur. Avgjørt er, at verður undirtøka, fara vit til Gjáar vikuskiftið 3. til 5. septembur.

Hesin túrur er eitt gott høvi hjá raktum og avvarandi at møtast. Her kunnu vit í hugnaligum umhvørvi vera saman eitt vikuskifti til gaman og álvara.

Ein partur av tiltakinum er ætlað til at viðgera felags áhugamál og til at stuðla hvørjum øðrum. Fyrraparturin leygardag er ætlaður til at arbeiða við viðkomandi evnum, og um kvøldið verður veitsla.

Brøv til limirnar við upplýsingum um tilmelding v.m. verða send út síðst í juli mánaða.

Vónandi verður undirtøkan eins góð og hini árini.





# Dagur og vika klokkan 19

**Eina tíð framyvir fer Sjónvarp Føroya at senda tíðindasendingina, Dag og viku, klokkan 19 ístaðin fyri klokkan 20**

SJÓNVARP
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Meðan EM-endaspælið hevur verið seinastu vikurnar, hevur tíðindasendingin hjá Sjónvarpi Føroya, Dagur og vika, verið send klokkan 19 ístaðin fyri klokkan 20, orsakað av fótbóltsdystunum.

Katrin Petersen, virkandi tíðindaleiðari, í Sjónvarpi Føroya, sigur, at sjónvarpið hevur fingið góðan respons frá fólki nú tíðindasendingin er flutt fram. Tí hevur leiðslan í sjónvarpinum avgjørt, at halda fram við at senda Dag og viku klokkan sjey, sjálvt um EM-endaspælið endar sunnudagin.

Hetta verður í fyrstu syftu gjørt í eina royndartíð, áðrenn endalig støða verður tikin um at flyta tíðindasendingina fast fram. Hvussu leingi Dagur og vika verður send klokkan 19, er ikki endaliga avgjørt enn.

*Í eina tíð framyvir verður roynt at senda Dag og viku klokkan 19 ístaðin fyri klokkan 20*

*Savnsmynd*

# Ólavsøka mitt í Keypmannahavn

**Skipað verður fyri føroyskari ólavsøku á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn**

ÓLAVSØKA
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Tað er ikki bert her heima, at nógv verður gjørt burturúr ólavsøkuni. Eisini í Keypmannahavn verður í ár skipað fyri stórari ólavsøku. Siður er at halda ólavsøku í Føroyahúsinum í Keypmannahavn hvørt ár, og ólavsøkan verður eisini hildin í danska høvuðsstaðnum í ár. Hesuferð tó ikki í Føroyahúsinum.

Nýggja og stásisliga Norðurbryggjan verður í ár karmur um ólavsøkuna.

– Nú hava vit skipað fyri ólavsøku inni í Føroyahúsinum hvørt ár, og tá vit eru har, so eru møguleikarnir fyri uttandura aktiviteti ikki teir stóru, og tað hava vit saknað, sigur Martin Fjallstein, leiðari í Føroyahúsinum.

Saman við føroysku feløgunum í Keypmannahavn varð tí tikið stig til at flyta ólavsøkuna av Vesterbrogade og yvir í Norðurbryggjuna, har umstøðurnar fyri uttandura virksemi eru munandi betri.



*Martin Fjallstein (t.h) hevur í fleiri ár skipað fyri ólavsøku í Føroyahúsinum í Keypmannahavn. Niels Salmony (t.v) er formaður í arbeiðsbólkinum, sum í ár skal skipa fyri ólavsøkuni á Norðurbryggjuni í danska høvuðsstaðnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Okkurt fyri øll

Stigtakararnir fóru undir fyrireikingarnar til ólavsøkuna longu í mars mánaði. Og nú eftir fleiri fundir og nógv arbeiði eru øll loyvini komin uppá pláss.

Ein arbeiðsbólkur er settur at fyriskipa ólavsøkuna. Formaður er Niels Salmony.

– Vit vilja við ólavsøkuni fegin vísa øðrum, hvørjum vit eru errin av í Føroyum. Endamálið er at varveita føroyskan sið, men tað skal sjálvsagt eisini verða okkurt, sum danir og onnur kunnu koma til, sigur hann.

Byrjað verður við eini skrúðsigling við føroyskum bátum, og síðani setir Tryggvi Johansen, leiðari á føroysku sendistovuni, ólavsøkuna.

Kappróður verður fyri fyrstu ferð á skránni í ár. Hetta verður við føroyskum bátum frá ymsu róðrarfeløgunum á flatlondum.

Seinni ólavsøkuaftan verður dansur á Bryggjuni, har dansibólkurin BE4 við Ian Onghamar á odda fer at spæla. Somuleiðis ólavsøkuaftan verður skipað fyri fýrverki og felagssangi við somu sangheftunum, ið verða nýtt til midnáttarsangin á ólavsøku heima í Føroyum.

Ólavsøkudag verður millum annað skipað fyri stórari konsert við fleiri føroyskum tónleikarum. Nevnast kunnu Stanley Samuelsen, Hanus G. Johansen og Sámal Ravnsfjall.

Eisini verður okkurt serligt fyri børnini.

### Vænta nógv fólk

Tá ólavsøka hevur verið hildin í Føroyahúsinum hevur talið á vitjandi ligið millum 2 og 400. Fyrireikararnir bæði vænta og vóna, at fleiri leggjast afturat í ár.

– Um henda ólavsøkan eydnast væl, so hava vit lagt grundsteinin fyri einum føstum siði, siga teir báðir Martin Fjallstein og Niels Salmony.

– Karmarnir eru nú góðir at skipa fyri eini góðari ólavsøku.

TILBOÐ
Galdandi til 10. juli
- ella so leingi vøra er á goymslu



GOSBAÐ
• Við 10 jetdysum og frontpanel. Uttan armatur
• Veitingartíð 4-6 vikur
vanligur prísur 11.498,-
BERT 8.598,-
spar 2.900,-



DAMP MASSAGUKABINA
• Við fótmassagu, digitalari dampstýring, radio og ljósterapi.
• Mál: 83 x 118 cm
vanligur prísur 27.298,-
BERT 19.998,-
spar 7.300,-



HVÍTT BAÐIRÚMSMØBIL
• Við handtøkum, vaski, spegli og ljósi, men uttan blandingsbattarí.
• Verður latið samlað
vanligur prísur 7.098,-
BERT 3.898,-
spar 3.200,-

damor
KVÍGGJARTÚN 3 • ARGIR • TEL 315415 • FAX 319001